# Frem vann útsettan dyst

Liðfelagarnir hjá Atla Danielsen vunnu í gjár 4-0 í útsetta dystinum móti Lolland-Falster. Soleiðis fekk felagið ein lítlan glotta í stríðnum fyri at bjarga tilveruni, men fíggjarliga er langt ífrá víst, at felagið fer at hóra undan. Fyrr hava boðini verið, at felagið hevur dagin í dag afturat at finna nýggjan kapital. Er hesin ikki fingin til høldar, krevja spælararnir – sum enn eiga mánaðarlønina fyri mai tilgóðar – at felagið verður koyrt á húsagang.



# Zlatan til Barca

Sambært spanska El Mundo Deportivo skal Zlatan Ibrahimovic spæla við europisku meistarunum úr Barcelona. Blaðið skrivar, at Barcelona og Inter eru samd um ein handil, har Barcelona skal rinda 75 milliónir í reiðum peningi, umframt at Samuel Eto'o skal skifta til Inter. Blaðið skrivar, at einasta forðingin í løtuni eru lønarkrøvini hjá Eto'o, sum enn eru nakað meira enn tað, sum Inter vil gjalda spælaranum.

# u ikki nóg neyv



*Úrslitið var á leið tað, sum tað plagar at vera móti Serbia – og fyri hetta, Jugoslavia – men fagnaðurin hjá serbum um málini prógvaði, at teir hesa ferð kendu seg meira kroystar, enn teir nakran tíð áður hava verið*

## FAKTA um dystin

**Føroyar-Serbia 0-2 (0-1)**
HM-undankapping, Tórsvøllur, mikudagin 10. juni kl. 19.15
**0-1:** Milan Jovanovic, 44.
**0-2:** Neven Subotic, 62.
**Dómari:** Meir Levi (Ísrael)
**Hjálpardómarar:** Abed Al Ramili & Shimon Dvir (Ísrael)
**4. dómari:** Alon Yefet (Ísrael)
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen – Jónas Þór Næs, Egil á Bø, Atli Gregersen, Jóhan Troest Davidsen – Bogi Løkin, Atli Danielsen, Fróði Benjaminsen, Súni Olsen (Jann Ingi Petersen, 77.), Símun Samuelsen (Christian Høgni Jacobsen, 69.) – Christian Lamhauge Holst (Andrew av Fløtum, 87.)
**Á bonkinum:** Meinhardt Joensen, Bartal Eliasen, Einar T. Hansen, Hjalgrím Elttør
**Gult kort:** Atli Danielsen
**Venjari:** Brian Kerr
**Russland:** Vladimir Stojkovic – Branislav Ivanovic, Neven Subotic, Aleksandar Lukovic, Aleksandar Kolarov – Milos Krasic (Gojko Kazar, 83.), Nenad Milijas, Zdravko Kuzmanovic, Milan Jovanovic (Miralem Sulejmani, 77.) – Marko Pantelic (Danko Lazovic, 65.), Nikola Zigic
**Á bonkinum:** Bojan Isailovic, Antonio Rukavina, Ivica Dragutinovic, Nemanja Matic
**Gult kort:** Nenad Milijas
**Venjari:** Radomir Antic
**UEFA-eygleiðari:** Miguel Galan Torres (Spania)
**Dómaraeygleiðari:** Patrick Kelly (Írland)
**Áskoðarar:** 2.896

tíðini, eftir at Føroyar vóru farnar upp í altjóða fótbólt, tykist vera varðveittur ella komin aftur. Ímóti Serbia í gjár sást, at spælararnir ofraðu seg fult og heilt, og at ein arbeiddi fyri allar og allir fyri ein.

Fyrstu árini tóktist tað hjá nógvum at bila við skjótleikanum og bóltførleikanum soleiðis, at føroysku spælararnir ikki fingu náðir at flyta seg, bjóða til og samanspæla frammi á vøllinum.

### Í sama spori

Í gjár sást, at hvat hesum viðvíkur hava broytingarnar verið stórar. Tá ið Jógvan Martin Olsen síðsta heyst boðaði frá, at hann fór at leggja frá sær sum landsliðsvenjari, vísti hann á, at avrikini í fjør høvdu bent á, at nú vóru manningarligar fyritreytir fyri betri og meiri framrættaðum og álopssinnaðum fótbóltsspæli.

Í fjør vóru úrslitini ofta á góðari leið. Nú er nýggjur venjari settur, og tað er hugaligt at staðfesta, at fyrsta royndin hjá Brian Kerr vísti, at tað verður bygt víðari á góðu gongdina frá í fjør.

Nýggi venjarin hevði ikki gjørt stórvegis broytingar í manning og spælskipan. Einasti nýggi maðurin, miðverjin Atli Gregersen, tóktist finna seg væl saman við Egili á Bø, Jónas Þór Næs - við teimum framúr longu og týdningarmiklu innkøstunum - var sannur brandur á høgra vongverja, og Jóhan Troest Davidsen stóð seg væl í vinstra verjuborði.

Vongverjarnir bjóðaðu seg fleiri ferðir til í álopspartinum, og Jóhan hevði í 1. hálvleiki fínan møguleika at leggja Føroyar á odda. Eftir snilt samanspæl við Símun Samuelsen, sum tykist trívast alt betri á landsliðnum, varð Jóhan leysur innanfyri serbisku verjuna. Einsamallur við málverjanum valdi vongverjin at leggja bóltin ímóti handara síðuneti. Tað hevði málverjin longu frammanundan lisið av. Hann legði seg so mikið tíðliga, at møguleiki hevði verið hjá Jóhan at lagt bóltin inn við nærra stólpanum.

### Møguleikar og marginalir

Ógvuliga hugaligt var tað so ofta, sum tað eydnaðist okkara monnum at spæla seg ígjøgnum serbisku verjuna, og ógvuliga harmuligt var tað so ofta, sum tað ikki eydnaðist at fáa úrtøku burturúr møguleikunum.

Súni Olsen hevði fínan møguleika beinanvegin eftir uppspæl í høgru, men fluktarin eftir innleggið frá Símuni Samulesen fór dygst oman fyri handaru samankomingina. Og vit kundu hildið fram at nevnt møguleikar, tá ið eitt nú Christian Lamhauge Holst, Súni Olsen og innskifti Christian Høgni Jacobsen vóru í góðum støðum, uttan at tað eydnaðist at fáa mál.

At tað eydnaðist at spæla seg til møguleikar komst fyri ein part av, at serbiska liðið ikki spældi við tí ferð, tryggleika og flytingum, sum plaga at eyðkenna avrikini hjá liðum av Balkan. Tað tóktist sum um, at spælararnir eftir langt kappingarár kring Europa sóu fram til at fara í summarfrí í gjárkvøldið. Tað ráddi um at vinna uttan at leggja alt ov nógv fyri, og tað eydnaðist.

Tað var harmuligt, at tað skuldi ganga soleiðis, sum tað gjørdi. Gamaní hevði Jákup Mikkelsen í 1. hálvleiki onkrar refleksbjargingar av tí slagnum, sum hann er ein meistari í. Men sum tíðin leið, bendi alt á, at 1. hálvleikur skuldi enda málleysur. Ein minutt undan hvíldini kom hol á, og tá ið Serbia eitt korter eftir steðgin økti til 2-0, kendist tað sum um, at vónin um, at tað skuldi eydnast Føroyum at vinna stig, hvarv. Ikki fyrrenn síðstu løtuna royndu okkara menn at sprutta aftur, uttan at tað eydnaðist at fáa mál.

### Størri tyngd

Eftir stendur fyrst og fremst leikliga avrikið, og at tað eydnaðist at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Ikki minst hugaligt er tað at staðfesta, at sentrali miðvøllurin er so stinnur, sum hann sjáldan man hava verið áður. Súni Olsen tykist vera við at koma í fullar umdreyningar, og Atli Danielsen og Fróði Benjaminsen arbeiddu sum úlvar og vístu samstundis, at teir saman við Súna megna væl at spæla, eisini tá ið tað er tætt kring teir.

At Símun Samuelsen og Bogi Løkin stríddust nógv í verjupartinum og samstundis megnaðu at vera ógvuliga skjótir fram í økini aftanfyri vongverjarnar hjá Serbia og at spæla væl bar við sær, at tað var meiri tyngd og broddur í føroyska álopspartinum, enn tað ofta hevur verið.

Serbar fóru væl nøgdir úr Føroyum, og hóast tað ikki eydnaðist a-liðnum at endurtaka bragdið týskvøldið hjá U21 liðnum, sum vann 1-0 á Russlandi, so vóru stórir glottar at síggja. Hesa ferð vóru marginalirnir ikki við. Men um avrikið verður tað sama næstu ferð, so eigur góða úrslitið, sum vit framvegis bíða eftir, at verða skift frá dreymi og til veruleika.

Skotini, sum ikki vóru nóg neyv ímóti Serbia, munnu fara at verða neyvari eina aðru ferð!